# Koyristólur til tey ferðandi




*EasyRoller-koyristólurin minnir um hinar, men hevur stórar fyrimunir við sær, tá ein fer út at ferðast*

Norski "EasyRoller" hvørki rustar ella verður steðgaður í trygdareftirlitinum á flogvøllunum. Herfyri fekk uppfinnarin heiðursløn fyri henda stólin, ið mong hava bíðað eftir.

Øll, ið hava havt brúk fyri at taka koyristólin við sær í feriu, vita, hvat hendir í trygdareftirlitinum: Ávaringartónin fer at ýla, og øll eygu verða vend ímóti viðkomandi.

Fyri hann ella hana, sum eigur koyristólin er nú ein loysn funnin á hesum trupulleikanum, takkað verið norðmanninum Torbjørn Skjæran.

Longu í 2000 byrjaði hann arbeiðið at menna ein koyristól úr plastikki, og longu árið eftir varð fyrsti EasyRoller stólurin seldur. Tá EasyRoller 2 kom á marknaðin, byrjaði tað av álvara at koyra hjá Torbjørn.

Nú fæst koyristólurin í 100 prosent termoplast uttan leysar lutir, í einum nútíðar sniði og sum tí er øðrvísi enn teir siðbundnu stólarnir. Nú bíðar heimurin eftir uppfinning hansara. Hetta fyrsta árið væntar Torbjørn Skjæran at selja 700 stólar, harav 90 prosent teirra fara á útlendska marknaðin.

- Okkara mál er, at EasyRoller skal gerast ein altjóða standardur fyri øll sambýli og stovnar, sum ikki ynskja koyristólar úr metalli, sigur Torbjørn Skjæran.

# Einføld summarkapping við stórum vinningum

Aftur í summar bjóðar Sosialurin til eina spennandi kapping, hesaferð í samstarvi við Rás2. Kappingin byrjaði 9. mai og varir henda mánaðin út, har flogferðir við uppihaldi verða burturlutaðar tríggjar ferðir um vikuna.

Nú leggja báðir miðlarnir til brots aftur, í samstarvi við Atlantsflog, við eini einfaldari, men kortini sera spennandi kapping.

Fyri at vinna hesar góðu vinningarnar, skalt tú í roynd og veru bert svara rætt uppá fimm spurningar. So ert tú við.

Mannagongdin er henda: Hvønn dag, tá Sosialurin kemur út, fer Rás2 - millum klokkan 9 og 12 - at seta fokus á summarkappingina og tað ávísa ferðamálið á rutunetinum hjá Atlantsflogi. Talan er um mánadag, mikudag og fríggjadag.

Eftir tíðindini kl. 11 verður eitt lítið prát, og frá klokkan 11:30 er tað at fólk kunnu ringja inn og svara rætt uppá teir fimm spurningarnar eftir 60 sekundum. Klárar lurtarin tað, hevur hann vunnið ein ferðaseðil við uppihaldi fyri tveir persónar eitt ávíst tíðarskeið.

Svarini uppá hesar fimm spurningarnar eru at finna í Sosialinum frammanundan. Tí kann ein lættliga svara spurningunum, meðan ein situr við blaðnum frammanfyri sær.

Vælkomin at vera við. Og góða ferð fyri tann hepna!


